Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Deyðilig leika

**LEIKA.** Ein fýra mánaðar gamal amerikanskur drongur varð í síðstu viku kvaldur av eini leiku frá heimskendu fyritøkuni Burger King.

Tað er vanligt, at hesar ketur lata leikur saman við mati, sum er at fáa til børnini, og ein av teimum best umtóktu leikunum í fjør, hevur nú gjørt av við tvey børn.

Zachary Jones, sum búði Indianapolis, lá í songini hjá sær og spældi við hendan lítla bóltin. Bólturin skrædnaði og setti seg fastan yvir munnin og nøsina hjá honum. Í desember mánaði doyði ein 13 mánaðar gomul genta á sama hátt

Burger King ætlar nú at taka tær 25 milliónirnar av leikuni, sum eru latnar á teirra matstovum, aftur, og teir hava gjørt sjónvarpslýsing, sum ávarar ímóti tí lítla deyðiliga bóltinum. Burger King útsendi eisini í desember mánaði eina ávaring um leikuna, men hon riggaði eftir øllum at døma ikki til fulnar.

Ein talsmaður fyri amerikansku fyritøkuna sigur, at bóltarnir vóru kannaðir væl, áðrenn teir vóru latnir børnunum, men tað er ikki vanligt at kanna, um leikurnar kunnu kvala børn.

# Oliver hevur framsýning

**LIST.** Í sambandi við útgávuna av fyrsti solofløguni hjá Jørgini Dahl, hevur listamaðurin Oliver við Neyst framsýning í handlinum hjá Tutl. Framsýningin letur upp samstundis, sum fløgan *Lost Pilmgrims* verður alment útgivin fríggjadagin.

Oliver hevur teknað kápumyndina á fløguni hjá Jørgini, og tí eru hesi bæði ting samantvinnað.

– Tað var mest sum av tilvild, at eg fekk uppgávuna at gera kápumyndina, men tá eg skuldi gera hana, royndi eg lesa tekstirnar og gera myndina í tráð við teir, sigur Oliver.

Oliver fer at hava bæði tekningar og málningar við á framsýningini, sum verður opin í mánað.



# Fáa oftari krabbamein

**KJARNORKA.** Amerikanskir myndugleikar viðurkenna nú, at fólk, sum starvast innan kjarnorkuídnaðin, fáa oftari krabbamein enn onnur fólk.

Tað er blaðið New York Times, sum hevur fingið hendur á einum skrivi frá amerikanska orkumálaráðnum til Hvítu Húsini, og upplýsingar úr skrivinum verða endurgivnar í blaðnum.

Sagt verður, at arbeiðsfólk, sum hava verið útsett fyri geislavirkni og kemikalium á 14 ymiskum kjarnorkuvápnastøðum í USA, hava økt tal av tilburðum av 22 ymiskum sløgum av krabbameini.

Skrivið hjá orkumálaráðnum er nú ein bumba undir almenna pástandinum um, at fólk, sum starvast í kjarnorkuídnaðinum, ikki gerast sjúkari enn onnur fólk.

Amerikanski forsetin, Bill Clinton, hevur sjálvur biðið um eina frágreiðing frá orkumálaráðnum, eftir at orkumálaráðið boðaði frá, at nøkur arbeiðsfólk høvdu fingið eina lungnasjúku frá evninum Beryllium.

Higartil hevur eingin fingið endurgjald fyri sjúku, men nú kann nýggja skrivið verða grundarlag fyri at lata sjúkum arbeiðsfólki endurgjald.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri 4. feb. 1999
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** Justinus@t-online.de
**Reply to:** Justinus@t-online.de

TELDU-POSTURIN

# Hønan ella eggið

Hvat kom fyrst hønan ella eggið? Kom eggið úr hønuni ella hønan úr egginum, hvat kom fyrst. Hendan spurning settu teir stóru filosoffarnir Sokrates, Platon og Aristofeles fyri gott 2400 árum síðan niðri í Athen. Hóast teir ikki vóru einastu filosoffar um hetta mundi, so byrjaðu teir at seta nýggjar spurningar til tilveruna. Teir vóru ikki heilt nøgdir við, at ein gudilig forkláring var upp á alt í lívinum. Teir ásannaðu, at menn vóru føddir við skili og at hendan skil kundi brúkast til at finna gongdar leiðir, at skilja ein part av skapannaraverkinum. Ikki soleiðis, at teir útilokaðu tann stóra skaparan, ella tann stóra íverksetaran, tí hesin var til onkunstaðni úti í oyðuni og eisini inni í okkum sjálvum. Teir tríggir stóru filosoffarnir, sum runnu saman aftur í kristindóminu, komu at hava stóra ávirkan á hvussu vit hugsa. Tann seinasti av hesum, Arostofeles kom helst næst at gita spurningin um hønuna og eggið, men tað er ein onnur søga.

Teir settu spurningar við lívið og teir komu eisini við uppskotum um hvussu lond skuldu stýrast. Eitt nú skutu teir upp eina demokratiska skipan sum eina gongda leið. Men demokrati hevði eisini eina skuggasíðu, helt Sokrates, tí við demokrati var vandi fyri at pøbilin fekk vald og tá kundi einki gott spyrjast burturúr.

Og spádómurin hjá Sokrates, hann er sannur. Um Hitler ikki gjørdist ríkiskanslari, so vóru milliónirnar í nazistaflokkinum framvegis pøbil og Týskland vildi næstan verið fyri somu vanlagnu um tað var Hitler ella onkur annar, sum mannaði Førarasessin.

Og nú rópar heimurin aftur bart. Ikki talingur um, at ein nazistuðul skal sleppa at sita í stjórn í einum landi, sum júst er tikið upp í felagsmarknaðin.

Spurningurin verður vendur aftur og fram. Er tað rætt av londum at leggja seg út í, hvussu onnur lond innanhýsis skipa stjórn?

Í heimlandinum hjá Hitler er ein víðgongdur á høgravonginum sloppin í stjórn saman við øðrum eitt sindur meira hóvligum.

Er tað rætt, at leggja seg út í hetta?

Spurningur sveimar hálvsvaraður. Hitler varð eisini demokratiskt valdur til ríkiskanslara. Hitler var somikið erligur, at hann áðrenn valið í 1933 ongantíð fjaldi, at hann nýtti demokratisku skipanina til at sleppa til valdið og at tá hann hevði fingið valdið, so vildi hann avtaka demokratiið og skipa fyri einum einaræði. Hetta varð týðuliga og greitt skrivað í »Mein Kamf« og í flokksskránni. Hendan erligheit hjá Føraranum er sum eitt haft um beinið hjá týska fólkinum í dag, tí júst hetta leggur ábyrgdina av ræðuleikunum undir seinna heimsbardaga beinleiðis á herðarnar á týska fólkinum. Týskarin valdi ein mann til at taka demokratisku skipanina av. Kanska vóru teir eitt sindur umskiltir, tí teir vóru vanir við ein sterkan Førara. Demokratiska traditiónin í Týsklandi átti ikki røtur longur aftur enn til Weimar republikkina, sum stjórnaðu Týsklandi eftir fyrra heimsbardaga. Tað vil siga at demkratiska skipanin í Týsklandi var ikki meira enn 15 ára gomul og hevði nógvar skeivleikar.

Síðan Hitler eru avleiðingarnar av verki hans, av hópdrápunum og ræðuleikunum enn lemjandi fyri nógv fólk. Tað svíður fast í sálini hjá týskarunum. Avleiðingarnar messað sítt javna lag. »Ongantíð aftur, ongantíð aftur«

Gongdin í Eysturríki fær tankarnar aftur at nema við Hitler og Holocoust. Vandi er fyri at pøbilin aftur fær vald og hesin óttin fer sum ein skjálvti gjøgnum vesturheimin.

Nú stórir partar av Eysturevropa liggja í búskaparligum sori, er eisini vandi fyri, at høgrakreftirnar aftur fara at vakna og londini kring Eysturríki kunnu aftur gerast ein krúttunna, sum tey hava verið fyrr.

Spurningurin um hønuna ella eggið var ringur at svara fyri 2400 árum síðan. Tó liggur eitt greitt í dag, ein nýggjur Hitler fær ikki so lætt við at sleppa til valdið í einum landi í vesturheiminum, soleingi minnið um »Holocoust« verður varðveitt. Hóast ungu týskararnir í dag onki hava havt við gomlu brotsverkinum hjá abbunum at gera, so mugu teir liva við, at heimurin heldur fram við at minnast ræðuleikarnar, fyri at byrgja fyri at ein nýggjur Hitler kemur á trónuna.

Tí heldur heimurin seg í dag ikki tigandi eins og í tríatiárunum, tá stjørnir verða skipaðar og mannahatskir politikkarar halda sem fram við. Heimurin leggur se útí stjórnarstríðið í, hann fer eisini at leggja seg út í um Pia Kjærsgaard ella Glistrup sleppa í stjórn í Danmark. Lat okkum vóna, at hann knallar nevan í borðið allastaðni, har mannahatsk fólk vilja sleppa fram at róðrinum.

**Jústinus Leivsson Eidesgaard, Hamburg**

post@sosialurin.fo





## FØÐINGAR

16. januar fingu Olga Fossdalsá og Eyðstein Joensen, Sandur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

21. januar fingu Randi Anthoniussen og Eyðun Mortensen, Vanløse, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3270 gr.

23. januar fingu Eileen Debess og Árni Holm, Porkeri, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

25. januar fingu Ann Mari Karbech Mouritsen og Marlin Eg Hoffmann, Hvidovre, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

26. januar fingu Guðrið og Sólberg Jacobsen, Vágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

26. januar fingu Gudny Jacobsen og Hans Erling Hansen, Fuglafjørður, eina dóttir. Hon var 44 cm. long og vigaði 1485 gr.

27. januar fingu Annika Reginsdóttir og Niels Winther Poulsen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4600 gr.

27. januar fingu Hildur L. Jákupsdóttir og John Olsen, Leirvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

28. januar fingu Sigga og Ole Guldborg Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

28. januar fekk Metha Dahl, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4030 gr.

28. januar fingu Katrin og Suni West, Tvøroyri, tvillingar, gentir. Tann eina var 48 cm. long og vigaði 2005 gr., hin var 48 cm. long og vigaði 2545 gr.

29. januar fingu Karhild Johansen og Høgni Davidsen, Æðuvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4050 gr.

30. januar fingu Lisa og Oslak Frederiksberg, Strendur, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

1. februar fingu Jónleyg Hansen og Jørgin Gudmundsson, Norðragøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

1. februar fingu Mariann D. og Pól Jákup Poulsen, Strendur, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

1. februar fingu Fríðgerð Jensen og Sigurbjørn Ragnarsson, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 2800 gr.



## ANDLÁT

27. januar:
**Jóan Hendrik Vík,** Haldórsvík, 91 ár
28. januar:
**Sigvard Sivertsen,** Klaksvík, 71 ár
**Oktavia Holm,** Tórshavn, 88 ár
**Edith Petersen,** Funningur, 83 ár
29. januar:
**Óli Hellu,** Vestmanna, 91 ár
30. januar:
**Bjørg Matras,** Tórshavn, 64 ár
**Mary Mortensen,** fødd Langaard, Sørvágur, 70 ár
31. januar:
**Álvi Olsen,** ættaður úr Leirvík, búsitandi í Tórshavn, 62 ár
1. februar:
**Jacobina Jacobsen,** Nólsoy, 63 ár
1. februar:
**Óluva Zachariassen,** í Hesti, 86 ár

## Prógv

**Heidi Hvidbro, Klaksvík, hevur 1. februar fingið prógv sum sosial- & sunnheitsassistentur frá København Sosial- og Sundhedsskole.**

**Pætur Midjord, Argir, hevur lokið yrkisútbúgving innan heilsøluyrki (bileykalutagoymslu). Læurupláss Sp/f Ivan Johansen Bilar.**

**Dagny Miðskarð, Klaksvík, hevur fingið prógv sum pedagog frá Ranum Statsseminarium.**

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 5. sunnudag eftir trettanda

*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Kvívík:* kl. 12, altarg., Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 12, Uni Næs. Talvan gongur fyri ytri missión
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, Heri Joensen
*Norðskála:* kl. 12, familjugudstænasta, Jónsvein Bech
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Fuglafjørður:* kl. 12, altarg., Peter O. K. Olofson
*Tvøroyri:* kl. 11, altargangur,
*Øravík:* kl. 12.15, P. M. Rasmussen
*Klaksvík:* kl. 11, altarg., Lisbeth Michelsen og Niels Pauli Danielsen
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Vágur:* kl. 11, Elsa Funding
*Hvannasund:* kl. 12, Meinhard Bjartalíð

### Frá Ebenezer

Sunnudag kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti. Mánadag kl. 20.00 bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00 sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl. 19.00 er møti.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn, í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgungudstænasta, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti (um viðrar). Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.

### Missiónsvika á Argjum

í døgunum 7.-13. februar 2000. Mánakvøldið kl. 20.00: Møti v/Hera Joensen, Manskórið í Meinigheitshúsinum luttekur. Týskvøldið kl. 20.00: Møti v/Ingolf Johannesen, Teir fýra luttaka við sangi.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla, kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 17.30 er bøn og kl. 18.00 er møti har Martin Olsen talar. Mánakvøldið kl. 20.00 bønarmøti hjá John og Monu, Kristiansgøta 12, verið øll hjartaliga vælkomin. Vit eru við í tiltakinum frá »Minus til Plus«.

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoma, 1000 ára haldið fyri kristniboðanini. Dagbjartur Debes greiðir frá um tað søguliga og mentunarliga.

4. grein skótar: Vit møta mánakvøldið kl. 19.30.

Týsdagin kl. 16.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Frelsunarherurin í Havn

Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti við Palla Petersen. Kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Major Thåland talar.

### Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 17.00 Møti. Teddy Petersen luttekur við sangi og talu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Zion, Kollafjørður

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

### Keldan, Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús v/Helga Abrahamsen, sunnudagin kl. 17.00 møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17.00.

### Missiónshúsið í Leirvík

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00 við Bárður Kass Nielsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14.00 sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl. 18.00 møti við Helenu og Katrin. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Hvalba

Møti verður leygardagin kl. 20.00 og sunnudagin kl. 18.00. Talarar Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20: Uppbyggingarfundur, talarar: John í Skemmuni og Símun Pætur á Torkilsheyggi.

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 18 evangel. fundur við John og Símun Pætur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Týsdagin kl. 20 ungdómsfundur.

Ónsdagin kl. 20 Uppbygg. fundur.

### Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

### Sjómansheimið Ørkin Reykjavík tlf. 354-5680777

Møti eru hvønn sunnudag kl. 15.00.

### Føroysku gudstænasturnar

í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.

(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

### Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

### Føroyska nærvarpið í Esbjerg

Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

## 70 ár

**Í dag, 5. februar verður Leivur Ellingsgaard, ursmiðjur, Klaksvík, 70 ár.**

**Hann er burturstaddur føðingardagin.**

## Brúdleyp

**Leygardagin 11. mars 2000 giftast í Hvalbiar kirkju, Noomi Hammerfoss, Froðba og Danjal Olsen, Hvalba.**

**Vælkomst verður í Royn-høllini kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 375071 ella 375129 í seinasta lagi 26. feb. 2000.**

## Gullbrúdleyp

**Í dag, 5. februar, hava hjúnini Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði gullbrúdleyp. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00**

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 5. feb.:* Magnus á Stongunum, tlf. 423006
*Sunnudagin 6. feb.:* Andrias Petersen, tlf. 441086

**Norðoyggjar:**
Sigvald Kristiansen, tlf. 455045

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

## Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.